UNDIRSKJAL

Vit prenta her eitt av undirskjølunum til samgonguskjalið hjá landsstýrissamgonguni. Helst finnast fleiri tílík undirskjøl ella kanska bert tvey, tí í hesum eina skjalinum, vit hava fingið hendur á, stendur einki um teir báðar stríðsspurningarnar í samgonguni, nevniliga javnstøðulógina og Namibiaspurningin. Kanska tað eydnast okkum at fáa tað til prentingar seinni.



Formenninir í teimum fýra samgonguflokkunum tá teir løgdu síðstu hond á samgonguskjal og undirskjal herfyri

Búskapur v.m.

Miðað verður ímóti at minka figgjarlógina fyri 1989 við umleið 200 mill. kr. í mun til framlagda uppskotið.

Vøksturin komandi árini má ikki verða størri enn búskaparvøksturin.

Miðað verður ímóti at minka uttanlandsskuldina í mun til bruttotjóðarúrtøkuna.

Samráðingar verða at taka upp við fakfeløgini um generelt lønarafturhald. Í hesum sambandi verða møguleikar fyri skattalætta viðgjørdir.

Innan 1. mai 1989 verður íloguætlan gjørd fyri landsstovnar og kommunur fyri 5 ár. Íloguætlanin fyri 1989 eigur ikki at fara upp um 700 mill. kr. Har verður annars endurskoðað á hvørjum ári.

Fyri privatar ilogur verður liknandi íloguætlan gjørd.

Miðað verður ímóti, at skuldin hjá kommununum minkar í mun til árligu skattaálikningina.

Skatta- og tollmál

Spurningurin um avtøku av oljugjaldinum til framleiðsluvirki verður viðgjørdur.

Reglugerð má gerast viðvíkjandi p-talinum soleiðis, at tryggjað verður, at upplýsingarnar bert verða givnar beinleiðis til likningarvaldið og bert í samband við skattauppgerð.

Fiskivinna

Loyvi eiga at verða givin til útskifting av skipum, sum treingja til ábøtur.

Stýrsskipannarmál

Um broyting verður framd av donsku grundlógini, verður málið um avtøku av føroysku fólkatingssessunum lagt fyri tingið.

Arbeitt verður víðari við álitinum um skipasýnismálið.

Spurningurin um yvirtøku av løgregluni verður kannaður við tí fyri eyga, at føroyingar kunnu yvirtaka ein part av hesari. Her verður m.a. hugsað um at endurstovna sýslumansembætini undir løgtinginum.

Landbúnaður

Lógin um jarðargrunnin verður eftirhugd.

Skúla- og mentannarmál

Í tann mun tað er neyðugt og ráð eru til, verður stuðul framvegis latin til bygging av bygda- og ungdómshúsum, ítróttarhallum, mentannarligum bygningum og bygningum til kristiligt fritíðararbeiði. Reglugerð verður gjørd.

Kanningin av viðurskiftum sjónvarpsins og útvarpsins snýr seg um møguliga umlegging til felagsleiðslu og sambygging og skipan annars av sendingunum í samstarvi við aðrar. Reglugerðirnar verða endurskoðaðar.

Tá ið kanningin er liðug, verður málið aftur viðgjørt í samgonguni. Spurningurin um útvarpsgjald pr. húsarhald verður kannaður.

Roynt verður at útvega Sjónvarpi Føroya aðrar inntøkur, eins og rationalisering má fremjast.

Kannað verður eftir teim fyrimunum, peningaliga og undirvisingarliga, sum standast av at byggja Studentaskúlan nærhendis Handilsskúlanum í Eysturoynni.

Arbeiðaramál

Spurningurin um »samordningsfradrag« hjá tænastumonnum v.m. verður tikin til viðgerðar.

Spurningurin um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn verður gjølla viðgjørdur av samgonguni. Búskaparliga ávirkanin av hesi skipan verður nágreiniliga kannað og møguleikarnir fyri øðrum pensiónsskipanum verða lýstir. Miðað verður ímóti, at landsstýrið stjórnar grunninum eftir ásettum reglum.

Kommunumál

Kommunur ella kommunalar eindir, ið sjálvar hava møguleikar at umsita ávís málsøki, sum í dag eru undir almennu umsitingini, eiga at fáa loyvi til tess — eitt nú almannamál, byggi- og brunamál, umhvørvismál og likningarmál.

Orkumál

Bøtt verður um samarbeiðið millum SEV og landsstýrið.

Tey manglandi loyvi til figging hjá SEV í sambandi við vatnorkuútbyggingina verða givin.

Arbeitt verður fyri, at víðari útbygging hjá SEV verður gjørd í samráð við landsstýrið.

Samferðslumál

Flogferðsla. Gjørt verður tað, sum er rímuligt og møguligt fyri at tryggja framtíðina hjá Atlantic Airways.

Almennir stovnar og landsumsitingin

Tryggingarlóggávan verður endurskoðað.

Almanna- og heilsumál

Spurningurin um einkjupensión verður viðgjørdur.

Familju- og trivnaðarmál

Tiltøk, sum minka um rúsevnismisnýtsluna, verða stuðlað eins og viðgerð av alkoholikarum fer fram her á landi.

Kannaður verður møguleikin at geva foreldrum størri valmøguleika at ansa egnum børnum, og málið verður viðgjørt.

Tiltøk verða sett í verk til tess at byrgja fyri tí vaksandi harðskapi og kriminaliteti.

Umhvørvismál

Náttúrufriðingarlógin verður endurskoðað.

Heilsuligu, umhvørvisligu og figgjarligu vansarnir av nýtslu av pikadekkum verða kannaðir.

bandsflokkin, enn hann veruliga kemur at fáa. Teir hava jú sagt frá, at tað var sjálvstýrisflokkurin, sum pindi teir niður við ynskjum um yvirtøkur, og tað kann væl vera at so er, men teir vita frá royndum, at tær avtalur, sum javnaðarflokkurin ger, tær heldur hann, og hann er eisini førur fyri at føra avtalurnar út í livið. Tað er ofta sagt, at tær yvirtøkur, sum framdar eru, tær eru framdar av javnaðarflokkinum og er samráðst fram til loysn gjøgnum javnaðarflokkin, meðan ongar yvirtøkur eru framdar tá aðrir hava roynt.

Eg skal ikki spáa, hvat kemur burtur úr tjóðskaparmálunum hesaferð — um tað verður sama úrslit sum undir hinum sokallaða sjálvstýrislandsstýrinum, men tær broytingar í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, sum kundu verið fingnar í samvinnu við javnaðarflokkin, tær vildu verið haldgóðar, vildu verið í samsvar við andan í heimastýrisskipanini og høvdu kunnað fingið undirtøku frá øllum pørtum innan ríkið.

Namibia!

Tað Atli Dam hevur frætt um innihaldið í undirskjalinum so finst spurningurin um Namibia als ikki har, men tað kann vera tí, at hann finst í einum øðrum undirskjali.

Uppá fyrispurning hvat hann heldur fólkaflokkurin fer at gera í málinum sigur Atli Dam, at tað veit ongin, tí tað verður dult. — Men eg eri ógvuliga bangin fyri at tað ikki verður ein sømulig loysn, sum aftur ger okkum til eina tjóð so demokratiskt funderaða, at vit kunnu vinna álit aftur í okkara grannalondum. Men livst so spyrst

jan

Flestar kilometrar uppá liturin



Uno

Bilfríðkan 17300

- Bókhald
- Grannskoðan
- Roknskapur
- Ráðgeving

Avgreiðsla:
Mán.-frí.: kl. 8.00-17.00

Pf. SANDOYAR BÓKHALDSVIRKI
tlf. 61376 - 210 Sandi

Eftirútbúgving

Føroya Byggifrøðingafelag skipar í vikunum 5—6—7-8 1989 fyri skeiðum í Tórshavn.

Skeiðevnini eru hesi:

1. GRUNDSKEIÐ - MS-DOS . (2 dagar) 3.—4. febr. 1989 (kostn. kr. 1.300)
2. GRUNDSKEIÐ - CAD (2 dagar) 9.—10. febr. 1989 (kostn. kr. 2.300)
3. AUTOCAD I. (3 dagar) 16.-17.-18. febr. 89 (kostn. kr. 2.750)
4. AUTOCAD II. (2 dagar) 23.-24. febr. 89 (kostn. 2.500)

Skeiðið vendir sær til virki, eftirlitsfólk og annars øllum áhugað.

Fráboðan um luttøku kann fara fram á tlf. 15996.

Avmarkað luttakaratal.

Enn eru nøkur fá plàss eftir.

FØROYA BYGGIFRØÐINGAFELAG